# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 27.06.2016 kl. 18:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Anna Brattaberg Samuelsen
Heri Hjelm
Poul W. Augustinussen
Eyðbritt Krosslá
Tórður Poulsen, var bert við til viðgerðina av málið 50/16 (seinast mál til viðgerðar)

Ikki møtt: Conrad Gaard Joensen, fráboðað
Dánjal Bjarkhamar, fráboðað

Nevndarskrivari: Petry Joensen



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 46/16 | 16/00181-4 | Vágs Sóknar Bygdasavn søkir um stuðul fyri 2016 | 3 |
| 47/16 | 16/00100-4 | Matr. 549a, møgliga keypast frá Hamrahaga | 4 |
| 48/16 | 16/00176-3 | Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 200a og 179a eigari er H. H. Holding | 5 |
| 49/16 | 16/00016-3 | Matr 1f, neystagrund, nýggjur leigusáttmáli | 6 |
| 50/16 | 13/00184-9 | Bygging við Kykslið, kloakk og vatnveiting | 7 |
| 51/16 | 16/00104-2 | Eykajáttan til Fjarlestur & íløguna í VágsHøll og flyta játtan hjá Vágs Ítr ráð | 9 |
| 52/16 | 16/00186-1 | Eykajáttan til yvirtøku av Vágs Ítr ráð | 10 |
| 53/16 | 16/00082-2 | Avskriva rest hjá Faroe Seafood | 11 |
| 54/16 | 16/00199-2 | Avskriva saldo deb 1045 | 11 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 55/16 | 16/00195-2 | Umsókn um at víðkað leiguøki undir Páls Høll matr. nr. 596h | 12 |
| 56/16 | 16/00173-2 | Skal Smyril hava seravtalu til einklult-túrar ella ikki ? | 13 |
| 57/16 | 16/00132-4 | South Pelagic kærir um leigupRís á Oyrunum | 14 |
| 58/16 | 16/00182-3 | Navngeving av kampingøkinum á Vágseiðið | 15 |

# 46/16 Vágs Sóknar Bygdasavn søkir um stuðul fyri 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.06.2016 | 62/16 | 16/00181-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 76/16 | 16/00181-4 |
| 3 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 46/16 | 16/00181-4 |

Vágs Sóknar Bygdasavn søkir um fíggjarliga stuðul fyri 2016. Undanfarin ár hevur verið stuðul latin á kr. 72.000,-

**Mentanarnevndin 13. juni 2016:**
Samtykt at stuðla við 72.000,- kr. MN ynskir fund við Vágs Sóknar Bygdasavn viðv. ma. prentsmiðjuna hjá Berg. og øking av aktiviteti.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Dennis Holm metti seg ógegnigan og var ikki við í viðgerðini. Eydis Kjærbo leiddi fundin í hesum málið.
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

# 47/16 Matr. 549a, møgliga keypast frá Hamrahaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 09.05.2016 | 11/16 | 16/00100-4 |
| 2 Havnanevndin | 13.06.2016 | 14/16 | 16/00100-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 72/16 | 16/00100-4 |
| 4 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 47/16 | 16/00100-4 |

Møguligt keyp av matr. 549A frá Hamrahaga.
Tekniska umsiting hevur í líknandi málum víst til vegleiðandi prísir hjá Landsverk, kr. 69,-/m². Øki sum talan er um er 998 m². Prísurin verður sostatt kr. 68.862,-
Hagastýrið skal í næstum hava fund um møguliga sølu. Støðan hjá hagastýrinum fyriliggur vónandi fyri fundin í Havnanevndini.

**Havnanevndin 09. maj 2016:**
Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**25. mai 2016:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum, og hevur Hamrahagi í skrivið 9. mai 2016 játta at teir eri sinnaðir at selja Vágs kommuna matr.nr. 549a inni á Oyrinum, teir geva til kennar at teir kenna til hvat kommuna hevur keypt jørð fyri frá øðrum borgarum og vísa á, at hervið hevur kommuna eitt útspæl um prís.

**Havnanevndin 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at mæla til at bjóða Hamrahaga galdandi almenna prísin fyri jørð, eins og kommuna hevur gjørt seinastu árini, tá jørð er keypt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt, at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Havnanevndini.

## 48/16 Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 200a og 179a eigari er H. H. Holding

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 33/16 | 16/00176-3 |
| 2 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 48/16 | 16/00176-3 |

H. H. Holding søkir um marknaumskipan millum matrikul nr. 200a og 179a. Ætlanin er at matrikul 200a letur uml. 1 gyllin til matrikul 179a.
H. H. Holdin er eigari av báðum matriklum.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at viðmæla hesum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Heri Hjelm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Einmælt samtykt at taka undir við hesum

## 49/16 Matr 1f, neystagrund, nýggjur leigusáttmáli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 15.02.2016 | 4/16 | 16/00016-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 32/16 | 16/00016-3 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 17/16 | 16/00016-3 |
| 4 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 49/16 | 16/00016-3 |

Henning Joensen hevur ringt til Suna Poulsen, og boðað frá at Martin Mikkelsen vil yvirtaka hansara leigumál.

Uppskot til leigusáttmála er viðheft og skrivað eins og teir síðstu sáttmálarnar, ið eru góðkendur til neystagrundir (td Elian Hansen og Arni Midjord).

**Havnanevndin 15. februar 2016:**
Havnanendin tekur undir við at nýggjur leigari yvurtekur leigumálið, men neystagrundin eigur at verða ruddað áðrenn skifti fer fram, vístandi til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at Martin Mikkelsen fær leigusáttmála. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt.

**16. juni 2016:**
Tað er ikki Martin Mikkelsen sum skal yvirtaka leigugrundina frá Henning Joensen men Jákup Mikkelsen. Málið verður lagt fyri býráðið av nýggjum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við at Jákup Mikkelsen yvirtekur leigumálið við treytunum sum Havnanevndin setur.

# 50/16 Bygging við Kykslið, kloakk og vatnveiting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 16.11.2015 | 30/15 | 13/00184-9 |
| 2 Tekniska nevnd | 15.02.2016 | 5/16 | 13/00184-9 |
| 3 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 29/16 | 13/00184-9 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 71/16 | 13/00184-9 |
| 5 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 50/16 | 13/00184-9 |

Vatnleidningur (Ø110) skal leggjast fram við vestaru síðu av vegnum, niðan ímóti ovaru røð av húsum. Vatnleiðingin má knýtast í eystanfyri 'Báruna' tvs. at leiðingin má tvørtur-um høvuðsvegin. Kloakk frá nýggja býlinginum skal við í sama grevstur um høvuðsvegin.

11 Januar 2016
Arbeiði við vatnveiting, brandposti og kloakk er liðugt. Kostnaðurin fyri arbeiði sum Vágs kommuna gjørdi í nov/des 2015 bleiv kr. 150 tús.
Fyrispurningur er komin frá íbúðarfelagnum um/nær kommunan fer at asfaltera og seta upp gøtuljós. Prísmeting fyri gøtuljós er kr. 60 tús. Vegur og parkeringspláss er 1025 m², prísmeting fyri asfaltering liggur ímillum kr.215 - 385tús. Sí viðhefta prísmeting og tekning.
29 januar 2016 er rokning komin frá byggifelagnum fyri kloakk, rottanga v.m. á kr. 178 tús.

**Tekniska nevnd 16. november 2015:**
Samtykt var at biða entreprenør gerða hetta arbeiði sum skjótast.

**Tekniska nevnd 15. februar 2016:**
Málið verður tikið upp á komandi samgongufundi.

**25. mai 2016 nýtt í málinum:**
Fundur var á kommunuskrivstovuni 24. mai 2016 millum Vágs Timburhandil, Suðursmíð og borgarstjóran. Vágs Timburhandil og Suðursmíð hevði biði um fund og førdu teir fram, at teir nú ynskti at Vágs kommuna var við til at fáa gjørt liðugt, við og rundanum byggingina, við Kykslið, sum teimum var játtað áðrenn prosjektið fór í gongd.
Teir ynskja at Vágs kommuna var við at gjald kloakk (faktura frá 29. januar 2016), asfaltering og gøtuljós.
Tilboð er komið uppá asfaltering 25/5-2016.
Metti kostnaður fyri gøtuljós 60 tús., kloakk 178 tús., tilboð uppá asfaltering, avrætting/spræning 237 tús., avrætting/heitt asfalt 325 tús..
Samlað ein kostnaður fyri Vágs kommunu uppá 475 tús. ella 563 tús., alt eftir hvat tilboð uppá asfaltering verður valt.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at Vágs kommuna gjaldir partin av rokning fyri kloakk sum snýr seg um rør.
Tekniska nevnd ynskir ikki at Vágs kommuna átekur sær at gjalda fyri kloakkreinsiverk (rottanga).
Tekniska nevnd mælir til at arbeitt verður við at slættað økið, og at gøtuljós verða gjørd.
Asfaltering má bíða til seinni.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd. Tó ynskir Fíggjarnevndin at økið verður asfaltera nú og eykajáttan verður givin uppá 237.000,00 kr. til hetta av innistandandi.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.
Og gjalda rokning fyri kloakering áljóðandi 181.916,78 við mvg, gera gøtuljós og hampa økið, asfaltering má bíða til komandi ár.

## 51/16 Eykajáttan til Fjarlestur & íløguna í VágsHøll og flyta játtan hjá Vágs Ítr ráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.05.2016 | 44/16 | 16/00104-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2016 | 50/16 | 16/00104-2 |
| 3 Vágs Býráð | 30.05.2016 | 39/16 | 16/00104-2 |
| 4 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 51/16 | 16/00104-2 |

Mælt verður til at flyta játtanir frá Vágs Ítróttarráð til rakstur og íløgur á Eiðinum, ávíkavist kr 1.100.000 og kr. 512.000. Hetta "kostar" onki, men verður flutt av Vágs Ítróttarráð tí kommunan hevur yvirtikið hetta pr 1 jan 2016. Hetta skal ikki fyri aðrar nevndir / fundir, tí flytingin er "intern" á §5, sum Mentanarnevndin varar av.

Út frá bókaðum tølum 3 mðr 2016 sær tað ikki út til at játtanin fer at halda. Mælt verður til at játtað kr 150.000 til Fjarlestrardepilin og kr 388.000 til íløguna vesturi í høllini. Báðar eykajáttanir skulu fíggjast av innistandandi. Um eykajáttanirnar ikki verða latnar mugu ábyrgdarpersónarnir beinanvegin fáa boð um at spara ella gera onnur átøk, soleiðis at núverandi játtanir fyri 2016 halda.

**Mentanarnevndin 09. maj 2016:**
MN tekur undir við tilmælinum um at flyta ímillum konti á gein §5. Eisini tekur nevndin undir við eykajáttan til Fjarlestrardepilin og beinir málið í FN.

**Fíggjarnevndin 20. maj 2016:**
Einmælt samtykt.

**Vágs Býráð 30. maj 2016:**

Tórður Polsen møtir á fundi.
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, og veita eykajáttan av innistandandi.

**Nýtt í málinum 08.06.2016 :**
Játtanin, ið skal flytast frá Vágs Ítr ráð skal eisini hava 2 Býráðsviðgerðir, tí flutt verður millum rakstur og íløgur, altso kr. 1.100.000 til rakstur og kr. 512.000 til íløgur. Eftir hetta er ongin játtan til gamla VÍ, ið er yvirtikið.

Fjarlestrardepilin kr. 150.000 eyka til rakstur av innistandandi.

Íløgan í síðubygningin á Eiðinum má eisini fáa eykajáttan kr 388.000 av innistandandi.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum til seinnu viðgerð

## 52/16 Eykajáttan til yvirtøku av Vágs Ítr ráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 78/16 | 16/00186-1 |
| 2 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 52/16 | 16/00186-1 |

Víst verður til mál 15/00236 har Býráðið tann 25.01.2016 samtykti at VÍ skuldi yvirtakast.

Lánið hjá VÍ (saldo kr 3.717.730,77) er tann 01.02.2016 flutt yvir á stóra lánið hjá kommununi, men enn er ongin játtan til yvirtøkuna.

Tí verður mælt til at játtað eykajáttan við lántøku á kr. 3.718.000 (avrundað). Enn eru tó formellu tingini ikki endalig, so sum virðismeting, tinglýsing osv

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at viðmæla hesum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum, málið skal hava tvinnar viðgerðir.

## 53/16 Avskriva rest hjá Faroe Seafood

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2016 | 13/16 | 16/00082-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 67/16 | 16/00082-2 |
| 3 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 53/16 | 16/00082-2 |

Mælt verður til at avskriva kr 4.524,84, tí felagið er endaliga uppgjørt, har er onki at "koma eftir". Felagið hevur ikki verið virki í áravís.

**Havnanevndin 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at staðfest hetta tap. Málið verður lagt fyri Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Staðfest at avskriva hetta.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Býráðið staðfestir hetta tap.

## 54/16 Avskriva saldo deb 1045

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 68/16 | 16/00199-2 |
| 2 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 54/16 | 16/00199-2 |

Kommunulæknin plagdi at betala 1.000 kr/mðr fyri at búgva í íbúðini í gl SEV-húsinum. Hon er givin, at arbeiða her fast, og skuldin er fyri hennara síðsta mðr, ið var des 2015. Hetta er lutfallsliga lítil upphædd, og ABDH er flutt av landinum.

Bókhaldið mælir til, at avskriva skuldina á kr. 1.000.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at avskriva hetta.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at avskriva hett.

# 55/16 Umsókn um at víðkað leiguøki undir Páls Høll matr. nr. 596h

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2016 | 23/16 | 16/00195-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 74/16 | 16/00195-2 |
| 3 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 55/16 | 16/00195-2 |

John Hendrik Holm hevur í telduposti 10. juni 2016 vegna grunnin Páls Høll søkt Vágs kommunu um at víðka leigu økið undir Páls Høll matr. nr. 596h inni á Oyrunum við góðum 500 fermetrum. Hetta grunda á tær útbyggingar sum liggja fyri framman.

**Havnanevndin 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Dennis Holm metti seg ógegnigan og var ikki við í viðgerðini. Eydis Kjærbo leiddi fundin í hesum málið.
Eydis Kjærbo vísti á, at grunnurin hevur tørv á at broyta útbyggingina nakað og tí verður arbeitt við at fáa gjørt nýggjar tekningar, og skjótur hon tí upp, at útseta málið soleiðis at býráðið hevur ítøkiliga uppskot at taka støðu til.
Býráðið samtykti einmælt at taka undir við at taka málið av skránni.

## 56/16 Skal Smyril hava seravtalu til einklult-túrar ella ikki ?

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2016 | 21/16 | 16/00173-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 70/16 | 16/00173-2 |
| 3 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 56/16 | 16/00173-2 |

SSL hevur enn einaferð spurt serprís fyri at koma á Vág við Smyril. Hesaferð er talan um einkult-túrar hjá Smyril kunnu koma undir avtaluna um bunkring, tvs at SSL onki havna- og brúgvagjald skal gjalda, tí hetta skal verða umfata av teimum ca 20.000 kr/mðr við mvg. Í hesum føri hevur talan verið um túrin ísv landsdansistevnuna fyri børn og um Jóansøkutúrin.

Um hetta verður játtað missir kommunan uml 12.400 kr pr túr.

Umsitingin vil mæla frá, at ganga SSL á møti, og siga teimum, at onki verður broytt so leingi avtalan um bunkring er í gildi. Talan er um "smápengar" fyri SSL, tí Suðuroyarleiðin hevur 81 mió á Landsins Fíggjarlóg, so ein ella tveir túrar á Vág "kunnu ikki koppa nøkrum".

**Havnanevndin 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt, at mæla til at Vágs kommuna er jalig í samband viðv landsdansistevnuna og sinnað at avskriva hava- og brúgvagjaldið fyri hendan túrin. Hetta verður ikki galdandi fyri aðrar serstakar túrar.
Víst verðu somuleiðis á at tær 20.000,00 kr./mðr sum SSL gjaldir Vágs kommuna er fyri avtalu gjørda um bunkring og sum SSL sjálvir hava valt at gjalda til avtalan gongur út í 2017.
Málið verður beint til Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Havnanevndini. Somuleiðis samtykt at SSL kann gera stakar túrar á Vág har havna- og brúgvagjaldið ikki verður kraft (áleið í tráð við avtaluna), hóast hetta skal SSL altíð gjalda fyri fólk og farm. Hetta skal altíð fráboðast í góðari tíð.
Jóansøkan er ikki fevnd av hesum samtykt.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

## 57/16 South Pelagic kærir um leiguprís á Oyrunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2016 | 16/16 | 16/00132-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 69/16 | 16/00132-4 |
| 3 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 57/16 | 16/00132-4 |

**13-05-2016 :**
Alex Vilhelm (AV) hevur vegna South Pelagic (SP) skriva til kommununa (VK) um leiguprísir á Oyrunum. AV skrivar beint út, at teir ikki góðtaka prísin, sum er á rokningunum. Prísurin teir hava fingið er almenni prísurin eftir galdandi samtykt hjá VK fyri havnalagið.

AV skrivar inn vegna SP, men samstundis koyrir annað mál viðv skuld hjá SP har Christian Andreasen og Hartvig Joensen umboðað SP. Torført er at skina á, hvør hevur heimild at umboða SP?

Annars er tað bókhaldið, ið av sínum eintingum hevur sent rokningar viðv betong-elementunum til SP og aðrar eigarar av teimum. AV hevur partvís rætt í, at øll ikki betala eins á Oyrunum, men hetta "botnar" í, at Havnakontóri ikki boðar frá hvør eigur hvat á Oyrunum.

Fuglafjørður hevur áleið sama prís sum Vágur fyri slíkt.

Vanliga er tað ikki "keyparin", ið kann "diktera" prís. Umsitingin mælir frá, at rokningarnar til SP verða broyttar, og mælt verður til at halda fast við verandi leiguprísir á havnalagnum.

**08-06-2016 :**
South Pelagic hevur fingið akkord-skipan (mál 16/00131) har kommunan avskrivaði kr. 142.000, tí teir betaltu kr. 47.000. Í akkordini vóru nógvar rokningar viðv leigu av lendi á Oyrunum.

Umsitingin mælir til, at boðað felagnum frá, at prísirnir verða ikki broyttir á hesum sinni.

**Havnanevndin 13. juni 2016:**
Víst verðu á at hetta er almenni prísurin sum er galdandi fyri Vágs kommunu, og verður hann ikki broyttur.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Havnanevndini.

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Havnanevndini og Fíggjarnevndini.

## 58/16 Navngeving av kampingøkinum á Vágseiðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 34/16 | 16/00182-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2016 | 77/16 | 16/00182-3 |
| 3 Vágs Býráð | 27.06.2016 | 58/16 | 16/00182-3 |

Áheitan er komin frá Heygum & Petersen, advokatum, sum vegna Johan Vágseið hevur heitt á kommununa um at broyta navnið á kampingøkinum á Eiðinum, soleiðis at tað samsvarar við galdandi lóggávu (lóg um Marknaðarføring).
Umsitingin vil mæla at broyta navnið á kampingøkinum.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:**
Einmælt samtykt at skjóta upp at broyta navnið til Vágs Kamping.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2016:**
Fíggjarnevndin mælir til at broyta navnið til Kamping Vágseiðið

**Vágs Býráð 27. juni 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

**FUNDURIN LOKIN KL. 18:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samuelsen |
| Conrad Gaard Joensen | Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm |
| Poul W. Augustinussen | Tórður Poulsen | Eyðbritt Krosslá |